## DAGSINS MEINING

# Valið

Valið í dag er eitt hitt mest týðandi fólkatingsval í mong ár. Løgting og landsstýri standa frammanfyri sera stórum og tungum avgerðum. Føroyar standa á mangan hátt á einum vegamóti. Ein tann største avbjóðingin í dag er altjóðagerðin. Okkara ungdómur hevur alheimin sum arbeiðsmarknað og møguleikarnir eru at kalla markleysir, um forteytirnar eru í lagi. Týdningarmesta fortreytin er útbúgving og førleikar. Týdningarmesta tilfeingi í framtíðini verður vitan og førleikar — evni at laga seg eftir skiftandi umstøðum í einum heimi í áhaldandi og skjótari broyting. Heimurin stendur okkara vinnulívið opin um vinnulívið klárar at takla altjóðagerðina. Tað er tí altumráðandi fyri menning og framburð í Føroyum, at vit troyta møguleikarnar, ið altjóðagerðin bjóðar og at vit megna hetta.

Tað tykist sum vøtnini av álvara skiljast við valinum í dag. Øðrumegin sendur samgongan avklárað og samd um, at nú skulu viðurskiftini við ríkið greiðast við yvirtøkulóg og uttanríkspolitisku heimildunum. Hetta er tann sjálvstýriskós, sum er sett og vikið verður eftir øllum at døma ikki frá hesi kós. Samstundis sum hesin politikkur verður rikin á sjálvstýrisøkinum, verður hildið fram við tí vinnu,- búskapar og sosialpolitikki, sum samgongan hevur sett út í kortið við amgonguskjalinum. Hinvumegin stendur andstøðan, sum vil hava fullveldismálið frá hondini, áðrenn farið verður undir at reka tað, vit kunnu kalla dagsaktuella politikkin. Tað er henda stívrenda støða, sum hevur gjørt, at Tjóðveldisflokkuirn er endaður uttan fyri ávirkan. Veljarin kann ídag meta um, hvør kós gagnar landi og fólki mest. Tað skuldi ikki undra okkum um landsstýrissamgongan fekk undirtøku fyri sínum politikki við støði í tí breiðu tjóðskaparligu semjuni. Landsstýrissamgongan hevur skapað stabilitet og arbeiðsfrið, og fyri fyrstu ferð í fleiri ár gongur tað politiska arbeiðið fyri seg uttan brot, klandur og stríð. Hetta hevur stóran týdning fyri búskap og vinnulív.

Samgongan hevur sett sær nøkur mál fyri tey komandi árini. Við hesum er ætlanin, at Føroyar skulu gerast eitt av heimsins fremstu londum á øllum ølkjum tey næstu árini. Tað er sera umráðandi, at samgongan fær arbeiðsfrið til at leggja allar ætlanir fyri hesum málum til rættis og at seta hesar ætlanir í verk. Fyri fyrstu ferð í mong ár snýr politikkur seg um annað enn um fullveldi. Tað er sera umráðandi, at henda gongd sleppur at halda fram. Føroyingar eiga tí at stuðla øllum, ið kann styrkja hesa tilgongdina. Eitt gott val fyri samgonguflokkarnar fer at gagna tí góðu tilgongdini, og veljararnir hava tí allar góðar grundir til at geva løgmanni og flokki hansara álitisváttan í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Javnaðarflokkurin tryggjar nýggju Føroyar við nýhugsan og nýskapan !

**Eyðgunn Samuelsen**
*Javnaðarflokkurin*



VAL05

Vinnuliga, politiskt og samfelagsliga er neyðugt at hugsa nýtt. Framtíðarstøða Føroya snýr seg um, í hvønn mun vit megna at laga okkum til nýggjar og ørðvísi avbjóðingar. Hetta vil eitt javnaðarumboð á fólkatingi arbeiða fyri heldur enn at reypa av hvussu nógv mál ein vil reisa.

Danmark og hini norðanlond eru fyrimyndir fyri restina av Europa, tá ið tað kemur til at duga at laga seg til tær ørðvísi avbjóðingarnar, ið globaliseringin hevur við sær.

Tey eru fyrimyndir tí tey hava eina væl útbúna arbeiðsmegi, góðar møguleikar fyri útbúgving og eftirútbúgving, ein vælvirkandi arbeiðsmarknað og ikki minst eina vinnu ið megnar at umstilla seg til broyttar fortreytir.

Eisini vit í Føroyum mugu leggja dent á hvørjar fyrimunir og møguleikar vit hava. Eitt nú hava vit serstakan møguleika at kappast tá tað ræður um dygd og feskleika á okkara fiskavørum.

Vit skulu nú og í framtíðini velja nýggjar leiðir heldur enn vanahugsan ! Okkara besta tilfongi er eitt vitandi og virkisfúst fólk. Tí skulu vit halda fram at menna útbúgvingar møguleikarnar. Vit skulu skapa nýggjar vinnur. Og vit skulu royna nýggjar leiðir so vit fáa meira burturúr tí stóra vitannartilfongi vit longu eiga.

At hugsa nýggjar tankar krevur eisini at tú letur dyrnar upp út í heim og her er fólkatingsumboðanin eitt gott amboð. Vit mugu velja um Føroyar skulu lata dyrnar aftur og passa okkum sjálvi, ella um vit skulu lata upp fyri teimum møguleikum sum eitt víðka samstarv við útlendingar og umheimin gevur.

Fyri Javnaðarflokkin er valið greitt, vit vilja tryggja nýggju Føroyar við nýhugsan og nýskapan og tí vilja vit samstarva við umheimin og á tann hátt støðugt menna Føroyar. Fyrsta stigi er at fáa umboð á Fólkating aftur.

Góði veljari, vil tú vera við til at tryggja Føroyar á Fólkatingi tann 8 februar, so setur tú kross við eitt av valevnunum hjá Javnaðarflokkinum.

Gott val !

# Samstarv og úrslit

**Andrias Petersen**
*Valevni á Javnaðarlistanum*



VAL05

12. mars 1998 høvdu Jóannes Ejdesgaard og Marita Petersen, sála, fund við danska javnaðarflokkin, sum tá sat við stjórnarvaldinum. Úrslitið av hesum fundi var, at minni enn tríggjar mánaðir seinni fekk fuldveldislandstýrið eina avbera góða loysn í bankamálinum.

Í 1991 sótu donsku javnaðarmenninir í andstøðu, men kravið frá teimum, harímillum føroyska javnaðarmanninum Jákup Lindenskov til donsku fíggjarlógina var, at føroyskir fiskimenn fingu krígspensjón eftir somu treytum sum danskir. Hetta eydnaðist eisini.

Tvey mál, sum gjøgnum samráðing og semju vunnu føroyingum rættindi. Tvey mál, sum vóru Føroyum og føroyingum til almikið gagn.

Samgongan hevur trý týdningarmikil mál fyri framman, har fólkatingssessurin kann viðvirka til at finna eina loysn. Endurnýggjan av ríkisfelagsskapinum, heimildarlóg til uttanríkispolitik, og fullan limaskap í Norðurlandaráðnum. Hesi mál ætlar Javnaðarflokkurin sær at loysa við skilagóðum, konstruktivum samráðingum, sum vit ikki ivast í koma at eydnast.

Javnaðarumboðið á Fólkatingi fer at umboða okkum føroyingar á ein hátt, sum skapar virðing millum danskar politikarar, og virðing fyri Føroyum og føroyskum áhugamálum. So hava vit trúvirði, tá á stendur.

Hetta er tað vit nevna samstarv, sum gevur úrslit.

Javnaðarflokkurin arbeiðir við skili.

Vel tí Javnaðarflokkin á Fólkating.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.